um, sum nevndin skýtur upp verða settir í verk í Norðuroyggjum, við Streymin og í Suðuroy, verða 2—4 umlættingarpláss við hvønn stovnin, sum koma at virka á sama hátt sum umlættingarplássini á Fritíðarheiminum í Skrivaragøtu í Tórshavn.

Somuleiðis eiga nevndu stovnar at kunna skipa fyri fritíðartiltøkum aftan á skúlatíð. Tá eiga andveik børn og ung í høvuðsheitinum at hava atgongd til fritíðartiltøk fyri onnur børn og ung.

Víst verður til kanning í 3 pørtum frá royndum við at lata andveik børn ganga í vanligan fólkaskúla í Esbjerg kommunu:

»Integration af debile børn i folkeskolen« Sydjysk Universitetsforlag

1. delrapport 1976
2. delrapport 1978
3. delrapport 1981

Niðurstøðan í hesi kanning er millum annað, at neyðugt er við eini trygdarskipan: Tað kann til dømis vera ein lærari, sum hevur royndir í at umgangast og undirvísa brekaðum børnum, sum hevur til høvuðsuppgávu at stúdla brekaða barninum og ikki minst at vera vegleiðandi fyri lærararnar og næmingarnar annars. Tað er umráðandi at nevndi persónur er við í undirvísingini og í dagliga arbeiðinum á skúlanum, so hann kann lofta ivaspurningum, áðrenn kreppur taka seg upp. Um hetta ikki verður gjørt, kann tað sambært kanningini vera ein størri vanlukka fyri brekaðab arnið at koma í fólkaskúlan enn at koma í serskúla.

Nevndin heldur annars, at spurningar um undirvísing av brekaðum børnum átti at verið viðgjørdur í einum áliti fyri seg.

Mett verður, at tørvur er á einum ungdómspensjonati afturat í Suðurstreymoy til okkurt um 8 fólk, soleiðis at ein partur av teimum, sum nú búgva á Eirargarði 14—16 kann flyta út. So kundu onnur, sum nú búgva heima ella á stovni í Danmark komið á Eirargarð 14—16.

Viðvikjandi vaksnum andveikum. Bústaðarviðurskifti og arbeiðsmøguleikar.

Høvuðssjónarmiðið er, at andveik, eins og onnur, skulu kunna flyta heimanifrá, tá ið tey gerast vaksin.

Annað høvuðssjónarmiðið viðv. bústaði er, at tað skulu vera so smáar eindir, at tey, eins og onnur húsfólk, kenna hvørt annað.

Triðja høvuðssjónarmiðið er, at eingin er ov andveikur at búgva í einum vanligum bústaðarøki ella bylingi, men hjálpin skal laga seg eftir tørvinum hjá tí einstaka.

Fjórða høvuðssjónarmiðið er, at bústaðarmøguleikarnir skulu vera so fjølbroyttir sum hjá fólki annars. Her verður hugsað um íbúðir, búfelagsskapir, sum pensjonat og tílíkt og vanlig sethús.

Í Norðoyggjum metir nevndin, at hugsast má um minst 8 bústaðir, helst so at tað eru 2 húski.

Hesir somu stovnar skulu hava 2—3 umlættingarpláss og 1—2 uppvenjingarpláss, sum nevnt omanfyri.

Nevndin skýtur somuleiðis upp, at vardur verkstaður verður skipaður í samband við stovnin, men helst í húsum fyri seg, sum bæði skal taka ímóti fólkunum frá stovninum og heimabúgvandi. Í Norðuroyggjum eru 21 andveik í aldrinum 15—60. Samlaða talið í Norðuroyggjum er umleið 33. (Skjal 9, síða 19—20). Av hesum eru 13 á stovni.

Við Streymin: Nevndin metir, at helst er neyðugt at samskipa tiltøkini í Eysturoynni og í Norðurstreymoy.

Sambært kanningini hjá Elsbu Olsen, sosialráðgevara, kemur størsta talið av andveikum úr Eysturoynni og Streymoynni. Tølini fyri Streymoynna eru ikki sundurgreinað í Norður- og Suðurstreym. Tó upplýsir Elsba Olsen, at 11 av 62 fólkum koma úr Norðurstreymoy.

Av hesum 11 fólkunum eru 4 børn.

Kanningin vísir, at í Eysturoynni eru 68 andveik. Av hesum eru 12 børn. Nógv flest koma frá vestursíðuni av Eysturoynni og Skálafjørðinum.

Við hesum í huga metir nevndin, at rættast er, at ein komandi stovnur verður settur við Streymin, fyri at gera flutningin sum stytstan.

Nevndin metir, at hugsast má um 10—12 bústaðir í 2 húskjum. Stovnurin má harumframt hava 3—4 uppvenji navnarpláss, og har afturat 3—4 umlættingarpláss.

Eysturoyggin er betur fyri, hvat arbeiði viðvíkur, enn landið sum heild. Tað hevur fört við sær, at fleiri andveik eru í vanligum arbeiði. Í teirri trúgv, at hetta eisini verður møguligt í framtíðini, metir nevndin, at nóg mikið er við einum verkstaði í fyrstu atløgu. Á hesum verkstaði eigur at vera pláss til eini 20 fólk. Nevndin hevur ikki tikið við í metingina, um húsini við Áir eru egnað, men væl er hugsandi, at tey eru tað, um tey annars eru tøk.

Suðurstreymoy: Um útbyggingin, ið nevndin skýtur upp, verður framd, metir nevndin at verandi stovnar nøkta tørvin í Suðurstreymoy, burtursæð frá at nevndin metir, at neyðugt er við einum **Pensjonati** afturat, serliga ætlaðum ungum, við 8—10 plássum. Eisini metir nevndin, at neyðugt er við einum **dagheimi** til tey vánaligast stillaðu. Talan er um stovn, ið serliga leggur dent á venjing og itriv. Eingin slíkur stovnur er í landinum, men eru vælkendir í øðrum londum. Nevndin hugsar sær dagheimið sum ein uppibygning til verkstaðið »Vón«. Kanningar vísa, at hetta ber til bæði hvat viðvíkur byggiøki, byggitekniskt og hvat viðvíkur felags hentleikum sum hita, vatni o.ø.

Í løtuni eru 4 fólk á Eirargarði 14—16, sum hava tørv á dagheimi. Hesi hava einki tilboð sum er. Annars metir nevndin, at talan er um eini 6 fólk afturat, ið nú búgva heima ella eru á stovni í Danmark.

Nevndini er kunnugt, at ynski eru framkomin um, at bæði Eirargarður 14—16 og Pensjonatið skulu flytast út í smærri eindir. Hugsanin hevur verið, at Landssjúkrahúsið ella annar stovnur, t.d. lærlinga- ella næmingaheim, kundu tikið yvir bygningarnar Eirargarð 14—16 fyri tað, teir veruliga kosta. Peningurin skuldi so verið tøkur til fleiri smærri eindir, svarandi til tað talið á plássum, ið nú er.

Somuleiðis átti Pensjonatið, sum í løtuni rindar kr. 118.000 í húsaleigu til Landssjúkrahúsið um árið at kunna flutt út í høskandi hús. Á Pensjonatinum og lutvis eisini á Eirargarði 14—16 verður stórur partur av húsliga arbeiðinum gjørt av starvsfólkum og husfólkum í felag.

Nýtslan av tænastum frá Landssjúkrahúsinum er minkandi. Til dømis fær Andveikraverndin ikki longur lækna- ella sjúkrasystratænastu frá Landssjúkrahúsinum. Tær tænastur Andveikraverndin í løtuni fær frá Landssjúkrahúsinum kann hon eins væl gjalda fyri hvar sum helst í landinum.

Nevndin hevur ikki viðgjørt spurningin um flyting frá Landssjúkrahúsøkinum gjølla, men er samd um, at grundarlagið fyri tilknýti til landssjúkrahúsið er burturdottið.

Somuleiðis metir nevndin, at andveik ikki hoyra heima á sjúkrahúsøkinum, uttan so tey eru sjúk, og at tað tí er rímuligt at arbeiða fram ímóti at skipa stovnarnar í smærri eindir. Starvsfólk við Andveikraverndina meta, at tað ikki verður meira kostnaðarmikið at flyta út í smærri eindir við sama tali av húsfólkum enn tað, Eirargarður 4, 14 og 16 kosta í løtuni.

Sandoy og Vágoy: Nevndini kunnugt eru ikki nóg nógv heimabúgvandi í hesum oyggjum til, at tað gevur grundarlag fyri at seta serlig tiltøk í verk í løtuni. Hinvegin eru 9 sandoyingar á stovni í Føroyum og í Danmark, umframt 4 heimabúgvandi.

Í Vágum eru somuleiðis 15 andveik. Av hesum eru 9 á stovni. Hugsandi er, at tiltøk verða sett í verk í nevndu oyggjum sum liður í, at stórir stovnar verða niðurlagdir.

Suðuroy: Tað nevndin veit um, er talan um 40 andveikar suðuroyingar. Av hesum eru vit vitandi um 5 børn, men helst eru fleiri.

Mett verur, at bygningarnir hjá Loranstøðini úti á Bakka í Vági, kunnu í fyrsta umfari verða nýttir til bústað, umlættingarpláss, uppvenjingarpláss og verkstað. Helst verður neyðugt við einum verkstaði í norðaru helvt av Suðuroynni sum frá liður.

Húsini hjá Loranstøðini verða mett at kunna rúma 8—10 fólkum, umframt verkstaðarmøguleikar. Í frágreiðingini um húsini verður nevnt, at hent hevði verið, um nakað av økinum rundan um varð lagt til stovnin, soleiðis at møguligt varð at velta og at hava húsdjór.

Nevndin metir, at tað er vert at byrja við nevndu húsum, hóast hesi neyvan nøkta tørvin. (Men tað fer so at vísa seg).



Bygningarnir úti á Bakka kunnu í fyrsta umfari verða nýttir til bústað, umlættingarpláss, uppvenjingarpláss og verkstað



Húsini við Áir eru uttan iva egnað til verkstað fyri andveik heldur nevndin

Viðvikjandi setunarviðurskiftunum hjá starvsfólkum

Nevndin hevur ikki gjørt eina endaliga meting av tørvinum á starvsfólkum. Í løtuni starvast umleið 60 fólk fullan dag. Meginparturin er settur sum statstænastufólk undir Sosialstýrinum. Nakað minni enn 1/3 eru tímalønt hjálparfólk. So hvørt sum útbygt verður, fer starvsfólkatalið at økjast, men samstundis skuldi talið á føroyingum á donskum stovnum minka.

Nevndin metir, at starvsfólkini eiga at verða sett undir einum landsfevnandi stovni, men skulu vera í arbeiði á teimum stovnum, nevndin skýtur upp at seta í verk, umframt at vera tøk í teimum einstøku kommununum, har tørvurin er, soleiðis at starvsfólkið eisini kann koma í heimini, har brekað búgva:

Lógarheimild og figgjarliga grundarlagið undir einari ætlaðari útbygging

Sum nevnt omanfyri situr ein nevnd undir Sosialmálaráðnum og arbeiðir við uppskoti til lógarbroyting.

Nevndin er samd um, at ikki átti at verið neyðugt við serlóggávu fyri andveik, men so leingi sum tænasturnar til brekað sum heild eru so lítið útbygdar, kviðir nevndin fyri, at tað fer at ganga út yvir tey andveiku, um serloggávan fellur burtur. Nevndin metir tiskil ikki, at tíðin enn er komin til at avtaka serloggávuna.

Samlaðu útreiðslurnar til Andveikraverndina eru 27,8 mill. Av hesum verða 12,7 mill. goldið fyri uppihald hjá føroyingum á donskum stovnum. Henda upphædd eigur at minka, so hvørt sum fleiri føroyingar koma heim, og færri fara á stovn í Danmark.

Upphæddin, 12,7 mill., kundi hugsast at verða flutt til raksturin av komandi tiltøkum í Føroyum. Nevndin hevur ikki tikið støðu til, hvør bera skal byggikostnaðin, men metir tó, at danski staturin, ið, sum er, hevur ábyrgdina av andveikum í Føroyum, so eisini eigur at bera útreiðslurnar, eins og higartil, av nýbygningunum.

Nevndini er kunnugt, at serlig nevnd arbeiðir við spurninginum um »bloktilskot«, og hevur tí ikki tikið sær av hesum spurninginum. Tó er tað umráðandi at nevna, at skal útbyggingin fara fram, sum skotið verður upp, er neyðugt at partur av »bloktilskotinum«, um hetta kemur í lag, verður merktur til útbygging og rakstur av Andveikraverndini.

Samandráttur: Nevndin skýtur upp, at bygdir verða (ella um høskandi hús eru tøk til keyps ella sum longu eru ogn hjá tí almenna) samansettir stovnar, sum rúma bústaðarmøguleikum, umlættingarmøguleikum og uppvenjingarmøguleikum. Til hesar stovnar skulu verða knýtt verkstøð, ið bæði kunnu rúma heimabúgvandi og teimum, ið búgva á stovnum.

Nevndu stovnar eiga, eftir nevndarinnar meting, at setast í Norðoyggjum, við Streymin og í Suðuroy.

Harumframt metir nevndin, at neyðugt er við einum Pensjonati og einum dagheimi í Suðurstreymoy.

Somuleiðis metir nevndin,a at verandi stovnar, Eirargarður 4, 14 og 16 kunnu nýtast til annað endamál, treytað av, at møguleikar verða fingnir til vega til, at sama tal av fólki kann koma at búgva í smærri eindum.

Aðalsjónarmið í allari útbygging fyri andveik er, at tey skulu kunna liva so líkt eini vanligari tilveru sum gjørligt. Tað inniber, at børn og ung skulu kunna búgva heima og ganga í vøggustovu, barnagarði, fólkaskúla og fritíðarheimi sum onnur børn. Hjálpartiltøkini skulu veitast í heiminum og á teimum stovnum, har børnini koma.

Vaksin skulu kunna flyta heimanifrá og flyta í høskandi bústað, so líkum tí hjá vanligum vaksnum fólkum sum møguligt. Tey vaksnu skulu somuleiðis kunna koma til arbeiðis fyri eina løn, tey kunnu liva av.

Eingin føroyingur eigur at verða sendur á stovn í Danmark, tí ikki er pláss fyri honum í Føroyum.

Føroyingar á stovni í Danmark eig at fáa høvi til at velja, um teir vilja flyta heimastur«, siga tey 9 fólkini, sum hava gjørt álitið. Tey eru: Arni Olsen, Torben Risom Pedersen, Jórun Thorup, Jógvan Petersen, Marjun Sigurðsdóttir, Trúgvi Henriksen, Marita Joensen, Sanna Ellingsgaard, Jógvan Tróndheim.